# Hevur fingið skrivligt loyvi til nýggja Rasmus Effersøe

**Gudmund Mortensen á Tvøroyri skilir ikki, hví trupulleikar hava stungið seg upp um fiskiloyvi til nýgga Rasmus Effersøe. Øll loyvi eru ílagi, annars var báturin sjálvsagt ikki keyptur, sigur hann**

FISKISKAPUR
*Áki Bertholdsen*

Á Tvøroyri gongur í løtuni ein maður og veit ikki um hann er keyptur ella seldur. Ella tað er kanska rættari at siga, at hann veit ikki, um hann hevur fiskiloyvi ella ikki.

Tað er Gudmund Mortensen, reiðari. Herfyri keypti hann trolaran, Haukur, úr Íslandi og gav honum navnið Rasmus Effersøe. Ætlanin var, at hann skuldi yvitaka rættindini hjá gamla Rasmuss Effersøe, sum sostatt skal úr flotanum.

Men síðani hevur ivi tikið seg upp um tað yvirhøvur ber til at geva nýggja Rasmus Effersøe Fiskiloyvi undir Føroyum.

Hetta skip er nevniliga fyrrverandi Snoddið, sum fekk upphøggingarstuðul í sínari tíð, tá ið hann varð seldur til Íslands.

Og nú er Fiskimálastýrið komið eftir, at tað er ivingarsamt um tað yvirhøvur nakrantíð er loyvt at geva einum skipi fiskiloyvi aftur, sum einaferð hevur fingið fingið upphøggingarstuðul.

Gudmund Mortensen sigur, at áðrenn hann keypti trolaran úr Íslandi, útvegaði hann sær sjálvsagt øll tey neyðugu loyvini.



*– Enn er lagnan hjá nýggja tvøratrolaranum, Rasmus Effersø ikki avgjørd. Eg havi øll fingið øll loyvi, sigur reiðarin. Løgrøðingar kanna eftir um tað ber til at geva skipinum loyvi, sigur fiskimálaráðharrin*

– Annars varð báturin ongantíð keyptur, tað er sjálvsagt, sigur hann.

Hann sigur, at hann tískil bæði hevur fingið skrivligt fiskiloyvi og veiðiloyvi til nýggja bátin. Tvs, at tað eru loyvini hjá gamla Rasmus Effersøe, sum eru førd yvir á nýggja bátin og tað hevur hann skrivligt frá Fiskimálastýrinum.

Annars fór gamli Rasmus Effersøe ein túr afturat mikukvøldið. Nýggi Rasmus er í Havn, hann verður málaður og fær onkrar ábøtur og ætlanin var, at hann skuldi koma suður seinni í vikuni.

Men tá ið hesin túrurin hjá gamla Rasmus er liðugur um einar 10 dagar, var tað ætlanin at nýggi Rasmus Effersøe skuldi fara fyrsta túrin.

Fyri at kanna málið, hevur Fiskimálastýrið biðið um eina lógfrøðiliga meting av, um tað er loyvt at geva nýggja Rasmus Effersøe fiskiloyvi, hóast hann fekk upphøggingarstuðul fyri einum 10 árum síðani, tá ið hann nevndist Snoddið.

Gudmund Mortensen sigur, at enn hevur hann onki hoyrt aftur frá Fiskimálastýrinum.

Men hann dylir ikki fyri, at tað fer at koma sera illa við, um niðurstøðan nú verður, at hann ikki kann fáa fiskiloyvi.

Vit spurdu hann eisini, hvat fer at henda, um endaliga svarið úr Fiskimálastýrinum verður, at Rasmus ikki kann fáa Fiskiloyvi.

– Sum sagt havi eg longu fingið øll loyvini skrivliga. Verður niðurstøðan nú ein onnur, má Fiskimálastýrið taka tað við sær, sum tað ber í sær. So má onkur onnur loysn finnast, er tað einasta, hann vil siga um tað.

Men hann dugir ikki at skilja trupulkleikin.

– Hetta er ikki sama reiðarí, sum fekk upphøggingarstuðul. Hetta er eitt nýtt reiðarí og tað fer eitt skip úr flotanum ístaðin fyri, so eg skilji ikki trupulleikan, sigur Gudmund Mortensen

## Karsten Hansen aldrin verið so veikur sum nú

**– Vit hava hava fleiri tilboð um at leiga skip ístaðin til vaktarhald og bjarging á sjónum fyri Brimil, og teir møguleikarnir verða nú kannaðir, sigur Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fiskivinnumálum**

TRYGD Á SJÓNUM
*Áki Bertholdsen*

– Eg skilji onki av hesum longur. Men nú er støðan so álvarslig, at okkurt má henda.

Jørgen Niclasen, Landsstýrismaður í fiskivinnumálum, sigur, at hann veit ikki, hví málið um Brimil ikki kemur fyri í tinginum.

Karsten Hansen legði uppskot fyri tingið um at loysa ósemjuna um lønina hjá manningini á Brimli. Hann boðaði frá, at málið hevði slíka skund, at hann fór at biðja tingið víkja frá tíðarfreisitini, fyri at fáa tað skjótari avgreitt.

Men so steðgaði málið og tað kom ongantíð til viðgerðar í tinginum. Og tað stendur heldur ikki á skránni fyri tingfundin týsdagin, so enn er óvist, hvørja lagnu, uppskotið fær.

Jørgen Niclasn sigur, at hann hevur spurt seg fyri, men hann fær onki at vita um, hví málið ikki kemur fyri tingið.

Sjálvur hevur Karsten Hansen sagt, at orsøkin er, at hann vil hava alla samgonguna at taka ábyrgd av málinum og at tað er útsett, eftir at einstakir tinglimir eru farnir at seta spurnartekin við ætlanina.

Jørgen Niclasen heldur, at hetta er tann veikasta støðan, sum Karsten Hansen kundi koma í.

– Hann hevur lagt málið fyri tingið, men tað kemur ikki til viðgerðar, tí hann stúrir fyri avleiðingunum. Hetta er at fortelja fakfeløgunum, at Løgtingið vil onki gera við málið og tað fremur ikki samráðingarhugan hjá teimum, sigur Fiskimálaráðharrin. Sostatt tykist tað nú greiðari enn nakrantíð, at tað fæst ongin samráðingarloysn.

### Vilja leiga

Jørgen Niclasen at nú er støðan við at vera heilt álvarslig og tí er tað neyðugt at kanna aðrar møguleikar.

– Várróðurin er byrjaður og yvirhøvur veksur virksemið undir Føroyum ímóti vári. Tí er tað er sera óheppið, at vit mangla eitt skip, tí so er trygdin tilsvarandi skerd og eftirlitið somuleiðis.

Tí kannar Fiskimálastýrið nú møguleikan fyri at leiga eitt annað vaktarskip, ístaðin fyri Brimil.

Hann sigur, at Fiskimálastýrið hevur fleiri tilboð um skipm, sum kunnu leigast og hetta verður í kannað í løtuni. Men enn er onki avgjørt og tað veldst sjálvandi um, antin Brimil kemur í sigling skjótt, ella ikki.

Spurningurin er so, hvat hendur við Brimli um tað ikki eydnast at loysa málið nú

– Ein møguleiki, vit hava, er at vit leiga eitt annað skip og leiga Brimil út samstundis. Vit skulu eisini hava eisini eina fíggjarliga játtan, sum skal halda og tí kann tað koma uppá tal at leiga Brimil út.

Fiskimálaráðharrin skilir ikki gongdina í Brimlamálinum.

– Eitt krav um at fáa 40% í lønarhækking, sum Skipara- og Navigatørfelagið hevur tvíhildið um, kann ikki takast í álvara. Tí kann eg ikki lata vera við at fáa allar møguligar tankar um, antin nakað annað býr aftanfyri, um tað er politiskt, ella ikki. Eg sigi ikki, at tað er so, men hetta er so langt úti, at eg kann ikki lata vera við at fáa allar møguligar tankar, sigur Jørgen Niclasen.

Jørgen Niclasen:

## Ein keðilig støða

**– Tað kom óvart á meg, at ivi hevur tikið seg upp um fiskiloyvið hjá nýggja tvøratrolaranum, Rasmus Effersøe, sigur Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fiskivinnumálum**

FISKISKAPUR
*Áki Bertholdsen*



*– Tað kom dátt við, tá ið vit fingu at vita, at nýggi Rasmus Effersøe á Tvørotyri kanska ikki kann fáa fiskiloyvi, sigur Jørgen Niclasen, fiskimálaráðharrin*

Tað kom púra óvart á Jørgen Niclasen, at ivi nú hevur tikið seg upp, antin tað yvirhøvur ber til at geva nýggja tvøratrolaranum, Rasmus Effersøe, fiskiloyvi.

Eftir, at Rasmus Effersøe varð keyptur úr Íslandi um ársskiftið, er komið framm, at tað er kanska ólógligt at geva ghonum fiskiloyvi undir Føroyum.

Orsøkin er, at hetta er fýrrverandi toftatrolarin Snoddið, sum í síni tíð fekk upphøggingarstuðul, tá ið hann varð seldur til Íslands. Og nú verður sagt, at tað er ólógligt at geva skipið fiskiloyvi, sum einaferð hevur fingið upphøggingarstuðul.

Aðarastaðni í blaðnum í dag sigur reiðarin, Gudmund Mortensen, at hann hevur fingið skrivligt fiskiloyvi og veiðiloyvi til skipið.

– Tað er ikki rætt, sigur Jørgen Niclasen. Hann hevur fingið tilsøgn um loyvi og tað er ikki tað sama sum at fáa loyvi. Sostatt hevur hann ikki fingið loyvi enn, sigur hann.

Men hann sigur, at hetta er ein keðilig støða hjá øllum pørtum.

– Tá ið vit viðgjørdum málið um at flyta loyvini hjá gamla Rasmus Effersøe yvir á nýggja skipið, var ongastaðni viðmerkt í skjølunum, sum vit høvdu um skipið, at tað hevði fingið upphøggingarstuðul. Tað stendur heldur ikki á skipsblaðnum, ið er tað sama fyri skip, sum tinglýsingin er fyri aðrar ognir. Annars plagar slíkt at standa í skipsblaðnum.

Jørgen Niclasen sigur, at tí var tað ikki í hansara tonkum, at hann hevði fingið upphøggingartsuðul og tí hevur tað ongantíð verið uppi í viðgerðini.

– Men so mintust onkur, at hann hevði fingið upphøggingarstuðul og tá varð málið steðgað.

-Jørgen Niclasen sigur, at hetta kom dátt við.

Hann sigur, at samsvar er ikki ímillum danska og føroyska lógartekstin á hesum øki.

– Í mínum hugaheimi hevði uppøggingarstuðulin til endamáls at minka fiskiorkuna. Í hesum føri er talan um eitt nýtt reiðarí og um, at eitt annað skip fer úr flotanum, men fiskiorkan hvørki veksur ella minkar.

–Tí er hetta ein tulkingarspurningur. Og tað er onki at gera, uttan at kanna málið til botns. Og sostatt havi eg biðið um eina lógfrøðiliga meting. Og so fara vit víðari haðani frá.

Jørgen Niclasen sigur, at enn er metingin ikki liðug, men tað verður ein av døgunum.



# Fólkaatkvøðan er ógreið



*Danski serfrøðingurin í ríkisfelagsskapinum, Frederikk Harhoff, heldur, at tað verður ein ógvuliga ørkymlað veljarafjøld, sum 26. mai skal taka støðu til nýggja fullveldisleistin hjá landsstýrinum.*

**Frederik Harhoff, serfrøðingur í ríkisfelagsskapinum, heldur stóran vanda vera fyri, at fólkaatkvøðan í mai fer at ørkymla føroyska veljaran. Landsstýrið sigur eitt og stjórnin eitt annað, og hetta fer uttan iva at ávirka støðutakanina hjá fólki. Og tað er óheppið fyri eina fólkaatkvøðu, sigur Harhoff.**

FRAMTÍÐARSTØÐA FØROYA
*Magnus Dam*

Hóast hann meldaði rættiliga greitt og positivt út, tá ið landsstýrið borðreiddi við sínari nýggju fullveldisætlan, so hava hesir seinastu dagarnir ørkymlað danska professaran Frederikk Harhoff, sum er serfrøðingur í ríkisfelagsskapinum.

Hann setir nú spurnartekin við fólkaatkvøðuna 26. mai og spyr millum annað, hvat tað er, føroyski veljarin skal taka støðu til. Er tað í veruleikanum loysing, ella er tað bert eitt framhald av verandi skipan í ríkisfelagsskapinum í eitt nærri ásett tíðarskeið?

– Tað tykist ógreitt, hvat landsstýrið í veruleikanum vil. Sjálvur hevði eg ikki vitað, hvat eg hevði atvkøtt um, um eg luttók í fólkaatkvøðuni 26. mai, sigur Frederik Harhoff.

Støðan er nú, at landsstýrið leggur ein spurning út til fólkaatkvøðu, sum kann tulkast. Landsstýrið leggur eina tulking í, meðan stjórnin leggur eina aðra tulking í. Og hetta fer bert at ørkymla, heldur hann.

### Breið tulking

Harhoff heldur, at stjórnin hevur valt at tulka fólkaatkvøðuna í mai rættiliga breitt við at siga, at talan í veruleikanum er um eina fólkaatkvøðu um loysing. Men hinvegin heldur hann eisini, at tað er í lagi, at stjórnin tulkar støðuna á hendan hátt.

– Stjórnin hevur sett sær sjálvum spurningin, hvat landsstýrið í veruleikanum vil. Er talan um, at vit bara skulu halda fram undir verandi skipan eina tíð afturat og so skulu Føroyar loysa seinni, ella er talan um tað, sum landsstýrið alla tíðina hevur ætlað, nevniliga at loysa eftir einum nærri ásettum leisti? Og har hevur stjórnin valt at tulka støðuna soleiðis, at landsstýrið nú vil hava fólkið at taka støðu til, um Føroyar skulu fara úr ríkisfelagsskapinum. Stjórnin tekur tarvin við horninum, og hetta fyriheldur hon seg so til. Og tað haldi eg vera í lagi, tí hetta er greitt og tekur burtur øll ivamál, sigur Frederik Harhoff.

### Óneyðugt við fleiri fólkaatkvøðum

Danski professarin sær fyri sær eina rættiliga ørkymlaða veljarafjøld, tá ið fólkaatkvøðan verður 26. mai. Hann vísir á, at landsstýrið í sínari ætlan tosar um tvær fólkaatkvøður – eina í mai og eina 2012. Onnur er undir øllum umstøðum óneyðug, heldur hann.

– Um landsstýrið í fyrsta umfari bert ynskir øktar heimildir og fríari ræsir at yvirtaka málsøki, hví skal tann spurningurin so út til fólkaatkvøðu? Hetta er nakað, sum løgtingið kann gera av í samstarvi við stjórnina, og so kann heimastýrislógin broytast samsvarandi, um hetta er neyðugt. Tá er óneyðugt við einari fólkaatkvøðu nú, sum inniheldur fleiri element enn bert hetta, staðfestir hann.

– Eg kann garantera tær fyri, at kjakið upp undir fólkaatkvøðuna fer at snúgva seg um, hvørt hetta bert er ein spurningur um økt sjálvsstýri ella um hetta í veruleikanum er ein atkvøðugreiðsla um loysing. Báðir partar fara í valstríðnum at gera síni sjónarmið galdandi, vísir hann á.

– Skal fólkaatkvøðan vera demokratisk, so má hon skipast á ein hátt, so øll vita púra greitt, hvat tað er, tey atkvøða um. Og sum nú er, er talan um eina ómetaliga ógreiða fólkaatkvøðu, sigur hann.

### Fastlæsa støðuna

Frederikk Harhoff heldur eisini, at landsstýrið ger sær sjálvum eina bjarnatænastu við fólkaatkvøðuni í mai. Landsstýrið verður tá læst fast at tí innihaldinum, sum tann fólkaatkvøðan nú einaferð snýr seg um.

Fær landsstýrið undirtøku fyri ætlanini, so hevur landsstýrið bert hetta at fyrihalda seg til í einari samráðingarstøðu við danir. Og samráðast skulu partarnir undir øllum umstøðum, vísir Harhoff á.

– Hvat nú um stjórnin ikki kann eftirlíka føroyska kravinum um, at blokkurin skal minkast burtur eftir 12 árum? Um stjórnin til dømis sigur átta ár og heldur, at viðurskiftini eisini á annan hátt skulu víkja frá teimum, sum landsstýrið leggur upp til í fólkaatkvøðuni? Stjórnin er ikki bundin at einari føroyskari fólkaatkvøðu, men spurningurin er tá, um landsstýrið hevur nakað rásarúm. Føroyska fólkið hevur jú álagt landsstýrinum júst, hvussu viðurskiftini skulu skipast, vísir Frederikk Harhoff á.

### Samráðingarloysnin tann rætta

Frederikk Harhoff kemur her inn á tað, sum hann heldur hevur verið so óheppið fyri alla gongdina hetta seinasta árið. Báðir partar – bæði landsstýrið og danska stjórnin – vísa ov lítlan vilja til at geva seg. Landsstýrið hevur frá fyrstan tíð tvíhildið um, at hendan gongdin skal enda við loysing, og stjórnin hevur frá fyrstan tíð tvíhildið um, at ein tílík loysn inniber eina skiftistíð uppá fýra ár. Eingin vil slaka uppá hesi grundsjónarmiðini, sigur Frederikk Harhoff.

– Báðir partar hava gjørt mistøk, og nú eru vit komin í hesa óhepnu støðuna, har báðir partar kasta við runu, vísir Frederikk Harhoff á. Hann er sannførdur um, at bæði føroyingar og danir kundu verið eitt sindur meira uppfinnsamir gjøgnum alla gongdina, og at ein samráðingarloysn hevði verið nógv tann besta. Men nú ivast danski professarin í, hvussu vendist aftur.